# Tá ið Hitler kom í tingið

**Undir viðgerðini av fíggjarlógini varð sipað til, at Høgni Hoydal brúkar somu snildir sum nazistarnir undir krígnum fyri at vinna sær fólksins tokka. Katrin Dahl Jacobsen tók í so harðliga til orðanna, sigur løgtingsformaðurin, sum heldur tað vera eitt generelt problem**

AV SPORINUM
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Er tað í lagi, at ein tingmaður sipar til, at ein landsstýrismaður í Føroyum hevur líknandi karakter sum Hitler? Tann spurningin skal formansskapurin hjá løgtinginum viðgera í næstum. Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum, hevur kært Katrina Dahl Jacobsen í Javnaðarflokkinum fyri formansskapin, tí hon »brúkti meginpartin av síni røðu til útspilling« av sær.

»Hon helt á røðarapallinum eina mynd upp av undirritaða og legði meg undir propaganda og ósannleikar, ið kunnu samanberast við politikarar í Týsklandi undir nazistunum,« skrivar Høgni Hoydal í sínari kæru.

Hann vísir eisini til, at Kristian Magnussen úr Javnaðarflokkinum dagin fyri samanbar Tjóðveldisflokkin við terroristabólkar úr ETA og IRA undir viðgerðini av sama máli. Høgni Hoydal fílist á, at hvørki av hesum málum vórðu átalað av formanninum, sum fyrra dagin var Jørgen Niclasen og seinna dagin var Edmund Joensen.

»Hetta er sera vandamikið, tí slíkur atburður eggjar til hatur og spjaðing og vantandi virðing fyri fólkaræðinum í okkara samfelag,« sigur Høgni Hoydal í kæruni og vil hava formansskapin at siga sína hugsan.

Sosialurin hevur fingið úrskrift av orðunum, sum fullu av munninum hjá Katrin Dahl Jacobsen. Hon tosar um eina lýsing upp undir seinasta fólkatingsval, har Tjóðveldisflokkurin segði, at oljan var funnin. Hon kallar tað heimagjørda propaganda og ein roynd at villeiða fólkið.

»At mála alt ljósareytt, tað varð nógv brúkt amboð undir seinna veraldarbardaga, tá tað galt um at halda massunum uppi, at vera glað, at fyrigykla fólki ein annan veruleika enn tað, sum veruliga fór fram. Eg troysti mær ikki at nevna navnið á tí persóninum, men nakað av hesum snildunum hava okkara konservativu nationalistar eisini brúkt,« segði Katrin Dahl Jacobsen millum annað í røðuni.

Altso greiðar tilvísingar vóru til Hitler og hansara harkalið, sum høvdu ábyrgdina av, at allur heimurin var í loga og jødar í milliónatali vórðu gassaðir.

Edmund Joensen løgtingsformaður hevur fingið útskriftina og hevur lisið hana ígjøgnum. Hann sigur, at tað Katrin Dahl Jacobsen segði er ikki heilt tað sama, sum Høgni Hoydal skrivar í kæruni. Men hann viðgongur, at har er ov nógv undirforstaðið í orðunum hjá javnaðarkvinnuni, og tað dámar honum lítið.

– Yvirhøvur vera tað brúkt ov stór orð undir orðaskiftinum. Tað slepst kanska ikki undan, tá 32 løgtingsmenn og 9 landsstýrismenn kjakast og halda røður í 27 tímar. Onkuntíð verður í so harðliga tikið til, tá fólk hava tosað seg heit, og eingin flokkur er betri enn nakar annar. Men vanliga góðtaki eg ikki so sterk orð, sum Katrin Dahl Jacobsen tók til, sigur Edmund Joensen.

Edmund Joensen verjir seg við, at formenninir skiftu um sama mundið, sum Katrin Dahl Jacobsen tók so harðliga til orðanna, og tí glapp átalan burturímillum. Formansskapurin fer nú at viðgera kæruna frá Høgna Hoydal.







*Katrin Dahl Jacobsen úr Javnaðarflokkinum er kærd fyri málburð í tinginum*



**ÓSKIPAÐ VIÐGERÐ:** *Kjakið í tinginum mikudagin, hósdagin og fríggjadagin í síðstu viku fjakkaði aftur og fram. Uttan mál og mið. Stundum vatndeyvt og stundum knallhart. Ovast til vinstru síggjast Høgni Hoydal og Eyðun Elttør. Niðast vinstrumegin kjakast Bárður Nielsen og Alfred Olsen sínámillum, og høgrumegin heldur Jóannes Eidesgaard seg til bókina, sum alt snýr seg um: Fíggjarlógina fyri 2004*

*Myndir: Jens Kristian Vang*

# Orðaskiftið er ein vavgreytur

**Orðaskiftið um fíggjarlógina er skipað kaos, heldur Jógvan Arge, løgtingsmaður. Hann kundi hugsað sær, at stig vórðu tikin til nýggjar mannagongdir, sum góvu fólkinum betri fatan av, hvat løgtingið arbeiðir við, og flokkunum betri sømdir at fyrireika seg**

FÍGGJARLÓG
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Orðaskiftið fer allar vegir í senn. Ein tosar um einskiljingar, ein um studentaskúlar, ein annar um ferjusigling, ein um avgjald á bomm og sjokolátu, ein um sjúkrahús og so framvegis. Málsøkini á fíggjarlógini verða rætt og slætt vavd upp í ein vavgreyt í viðgerðini.

Tað sigur Jógvan Arge, løgtingsmaður. Hann var fyrstu ferð valdur á ting fyri Tjóðveldisflokkin í 2002, og sostatt hevur hann havt høvi at luttikið í tveimum fíggjarlógarviðgerðum higartil. Hann er eirindaleysur í sínari eftirmeting av árligu fíggjarlógarviðgerðini í løgtinginum. Orðaskiftið er óskipað og ørkymlar lurtaran, meira enn tað greiðir fløkjur fyri honum, heldur hann.

Orðaskiftið um fíggjarlógina tók samfullar tríggjar dagar. Tað er sent samstundis í bæði útvarpi og sjónvarpi. Hetta er helst týdningarmesta lógin, ið verður viðgjørd, tí hon leggur karmarnar fyri samfelagið og býtir virðini millum landsins borgarar. Við øðrum orðum er talan um ítøkiliga politikkin hjá politiska meirilutanum.

Men nógv munnu saman við Jógvani Arge sita eftir við einari tómari kenslu av, at orðaskiftið einki tekin gav um, hvat landsins kosnu kvinnur og menn ætla við landshúsarhaldinum næsta ár.

– Spurningurin er, um løgtingið ikki kundi viðgjørt fíggjarlógina á ein betur struktureraðan hátt, sum gav bæði tingfólkum og almenninginum eitt betri og tryggari innlit í hesa landsins týdningarmestu lóg og ta støðu, sum tingflokkarnir hava, sigur Jógvan Arge.

## Skipað kaos

Í fyrstu atløgu hugsar Jógvan Arge sær, at viðgerðin byrjar við einari munnligari framløgu frá landsstýrinum, har tikið verður saman um uppskotið og greitt verður frá, hvørjar ætlanir liggja í nýggja uppskotinum, hvørjar broytingar eru gjørdar í mun til farnu árini, og hvørji framtøk eru sett út í kortið.

– Tað plagar at vera eitt minstakrav til øll orðaskifti, at lagt verður upp til tey. Soleiðis er ikki her í tinginum, sigur Jógvan Arge.

Í øðrum lagi heldur Jógvan Arge viðgerðina minna mest um skipað kaos, tí orðaskiftið fer í allar ættir samstundis. Eingin stýring, eingin uppbýting í evni og eingi beinleiðis framsøgufólk í ymsu málunum.

– Tað hevði bøtt munandi um møguleikarnar at fáa nakað burtur úr orðaskiftinum, um viðgerðin varð løgd soleiðis til rættis, at til dømis almannamálini vórðu tikin fyri seg, vinnumálini fyri seg, fiskivinnan fyri seg, mentamálini fyri seg og so frameftir. Sjálvandi skuldi ein partur av orðaskiftinum eisini verið markaður til tann yvirskipaða fíggjarliga politikkin, sigur hann.

Jógvan Arge heitir á løgtingsformannin um at taka upp spurningin um at leggja orðaskiftið betur til rættis, so lurtarin, sum er veljarin, fær betri møguleika fyri at halda betur saman á sjónarmiðini og fólk fáa betri fatan av, hvat tað er, løgtingið arbeiðir við. Tað hevði eisini givið flokkunum betri møguleika at fyrireika seg til orðaskiftið við framsøgum til einstøku málsøkini.

– Sum nú er, kemur tann yvirskipaða viðgerðin og tann ítøkiliga umrøðan av málsøkjum slongjandi alt eftir, hvussu skjótur ein landsstýrismaður hevur verið at trýst á knøttin og biðið um orðið, ella ein tingmaður tekur tey upp, sigur Jógvan Arge.



*Jógvan Arge, tingmaður, eftirlýsir einum skipaðum orðaskifti*

# Edmund kannar tingskipan

**Løgtingsformaðurin heldur, at orðaskiftið um fíggjarlógina er óskipað og fer av kós, tí tingskipanin er ov leys. Hann kundi hugsað sær at broytt skipanina og kannar nú, um undirtøkuna er í hinum flokkunum fyri at broyta hana**

ORÐASKIFTI
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Løgtingsformaðurin tekur fult undir við, at orðaskiftið um fíggjarlógina mangan fer av sporinum, tí tað er ov illa skipað. Tað er Edmund Joensen sjálvur sum formaður, ið skal halda skil á orðaskiftinum, men hann heldur tað vera trupult við tí skipan, vit havam, tí tingmenn fara at reika.

– Eg haldi tað hevði verið upp á sítt pláss at fingið eina meiri strukt-ureraða viðgerð, tí tað er torført at stýra orðaskiftinum, sum nú er. Í dag er tað orðaskiftið um løgmansrøðuna, ið er ætlað at vera tað breiða høpi, har tingmenn og flokkar fáa høvi at markera seg. Men orðaskiftið um fíggjarlógina er vorðin ein endurtøka av løgmansrøðuni. Í viðgerðini av fíggjarlógini eiga vit meira konkret at halda okkum til yvirskipaðu raðfestingina av pengunum í samfelagnum, sigur Edmund Joensen.

Løgtingsformaðurin kundi hugsað sær eina viðgerð, har farið verður ígjøgnum einstøk øki og einstøk mál. Mentamál, heilsumál og vinnumál fyri seg, men tað krevur, at tingskipanin verður broytt.

Edmund Joensen ætlar sær nú at spyrja flokkarnar, hvat teir halda um at skipa fíggjarlógarviðgerðina øðrvísi. Skal tingskipanin broytast, krevur tað bara, at flokkarnir samtykkja tað, og so fer broytta skipanin at virka frá komandi tingsetu. Tingskipanin varð seinast broytt í 1999.